## VIÐMERKINGAR

# Sjómarkið millum Kvívík og Vestmanna

**HEINI OLSEN**
Verkfrøðingur





*Vestmanna*

Á landi skuldi markið vera áin við øllum bládýpunum har innast í firði – bládýpi so djúp, at paparnir nevndu tey heljareygu, heiti, ið síðani ta tíð hevur hingið við ánni. At sjómarkið út eftir vágni nakrantíð skuldi fáa týdning, rann ongum til hugs, so hetta varð tí als ikki umrøtt á hesum fyrsta fundi niðursetурbólkanna millum. Soleiðis hugleiðir Heini Olsen um tíðina, tá Egil og menn hansara á fysta sinni numu Válin og Vestmanna…

Undir heitinum »Meg minnist og ørminnist« havi eg so av og á fest okkurt á blað, sum liggja kann til børn og barnabørn, um nakar teirra seinni skuldu fingið hug at lisið tað.

Var so heppin at eiga tvær ommur á lívi, sum báðar vóru fullar í søgum, og verandi hálvur vestmenningur og hálvur válamaður, helt eg henda stubban um Egil kanska vera hóskandi til ástaðar(ástar)fundin bygdanna millum nú hósdagin 16. februar 2006.

---

**Egil**

Fyrsta, vit í 1965 vóru flutt til Føroya, varð eg ein leygardag á hásumri boðin við út á flot við bátinum, »Fimmbrøður« hjá Ingdori, sum átti fimm synir.

Poli var ikki við henda dagin. Bróður hansara, Óli, stóð fyri ferðini og passaði motorin.

Vit løgdu leiðina suður í Grunnarnar og haðani til havs at kalla, hetta uttan stórvegis fong – onkran hendinga fisk; men dýrdarveður var, og kendu vit okkum sum endurnýggjaðar, tá vit seint á degi aftur stevndu móti landi. Komnir inn móti Koltursnakki helt Óli, vit til stuttleika skuldu kasta eina ferð afturat, og í sjálvari hellingini vóru stórar longur í heinta.

Meðan vit so hugagóðir drógu, kom pollamjørkin sníkjandi uttan úr havi, og áðrenn vit fingu umrátt okkum, køvdi hann av, so vit einans hómaðu dimmið av Koltursnakki, hóast vit bert lógu fáar favnar úr landi.

Kort høvdu vit einki; men eftir kumpassini setti Óli kós í ein norðan, so mundu vit onkursvegna fara at raka Streymoynna, vóru vit samdir um.

Tá vit høvdu siglt um hálvan tíma ella so, hildu vit tað aftur myrkna av landi, og tók Óli beinavegin frá, tí hond sást ikki fyri stavn. Tá vit góða løtu høvdu slovað eftir somu kós, fór hann at skymast, hugdi uttanborða og rópti undrandi, at báturin stóð, og so var.

Vit høvdu rakt miðskeiðis á Leynarsandi, men sóu einki fyri mjørka. Eingin okkara var serliga kunnugur fram við landi undir Kvívíksklyvum, og hildu vit tað tí vera frægast at sigla einar tíggju minuttir spakuliga í ein útsynning út á Sundið og so snara í rættan vinkul á stýriborð. Tá vit kendu okkum aftur norðanvert Kvívík, var sloppið, tí hagani vóru vit meinkunnugir norður við landinum.

Mær rann í hug søguna um Egil, sum júst á sama hátt í mjørka róði seg inn á sandin, ið tá, sum kunnugt, ikki lá á Leynarlógv, men í víkini, har teir seinni høvdu kvíur gangandi - í Kvíuvík.

Hvussu var og ikki, er ilt at siga; men onkursvegna hevur Egil fyrstu ferðina sett fótin á land, og hvør veit, um ikki vísindaligar DNA-kanningar fara at finna onkran veruleika burtur úr øllum teim arvaðu ommusøgunum, sum við skakandi hendingum styttu okkum børnum stundir:

»Jú – menn Egils settu tjøld upp í víkini og av tí, at einki livandi var at síggja, fóru teir eftir fornum siði, alt tað teir við brandinum orkaðu renna, undir at taka land.

Fjallið niðan av víkini nevndu teir Egilsfjall, og lítlan tíma longur norðuri sóðu teir innan fyri høgt nes eina stóra vág umgjyrda av høgum fjøllum.

Nesið nevndu teir Egilsnes, men hildu seg annars framvegis høgt á haga, har landtøkubálini fjall av fjalli best kundu síggjast. Eitt undraðust menn yvir, og tað var geitukendan seyð, sum hægst á fjøllum gekk á biti; men var hann so styggur, at ikki hugsingur var um at fáa hendur á honum.

Egil kom sunnaneftir við trimum skipum, har hitt eina var mannað úr ættarbólki av kvika, men snarsinta upprunafólki Suðuroyggjanna og hitt av meira seinførum norðbúgvum av tí allar treiskasta slagnum inn av strondini í útsynningspartinum av Noregi, har gamalt var at vita, um ikki tað, sum gerast skuldi, við einum veti av umhugsni kanska kundi bíða til næsta dag.

Sjálvur hevði hann mannað skip sítt við teim frægastu til vit og skil úr báðum bólkum, hetta við serligum denti lagdan á, at teir sínámillum í sátt og semju dugdu hógv, og at teir saman vóru raskir í bardaga móti fremmandum fígginda.

Nú var næsta takið sjóvegis at kanna tað, teir eftir fjøllum høvdu lagt undir seg, og var, sum vera man mikið málageip, tá teir í víðu víkini innan fyri Egilsnes funnu friðarfólk av kallkyni, sum bert tókust við urtir, dunnur, høsn og seyð og annars uttan skjøldur og svørð løgdust á knæ undir krossi, tá hesir fremmandu nærkaðust landi.

Summir hildu best vera at drepa; men helt Egil onga orsøk vera til at avlíva verjuleysan mann, ið sum trælur kanska seinni kundi verða teimum til nyttu.

Úr djúpari gjógv leitaði stóra áin sær leiðina oman á sandin. Innan fyri ánna høvdu hesir fáu einbýlismenn, kring eitt størri hús, sett sær upp smáttur, sum norðbúgvarnir tóku til sín at húsast í, tí so sluppu teir fyribils frá at hugsa um innivist til sín sjálvs, neyt og svín, konur og børn og tað, teir annars høvdu havt við sær á havgangandi knørrunum.

Forspråkari papana, sum teir nevndust, hevði mest sum hug at mótmæla, at teir soleiðis vórðu riknir av húsi, og tá einki hjálpti, læs hann á egna máli sínum eina illbøn yvir hetta ránsmannaliðið, hetta mest sum eina langtíðarætlan soleiðis, at Gjógvaráin skuldi leypa og sópa alt livandi til sjós og at næsti, sum har setti grevið í, ikki skuldi ganga av árinum.

Ein av suðuroyabúgvunum skilti illbønina, og tá hann greiddi Egili frá henni, datt høvur papamansins til jarðar, áðrenn restin av kroppinum so mikið sum skakaðist.

Skipari suðuroyabúgvanna var tiltikin at vera skjótari við svørðinum enn heilin greiddi fylgja við, og gjørdist hetta fyrsti ófriður manningarnar millum, sum tó endaði við teirri semju, at norðbúgvaliðið skuldi hava hesa náttúruvardu vág, har skipini kundu liggja og suðuroyaliðið fyrstu víkina, har teir vóru lendir, Kvíuvíkina, har teir niðast móti sandinum skjótt bygdu sær langhús og fjós. Hóast lógvin var heldur brimvond, hildu teir tað kortini munna vera munin styttri á fiskileið enn úr vágni har norðuri í sundinum.

Á landi skuldi markið vera áin við øllum bládýpunum har innast í firði – bládýpi so djúp, at paparnir nevndu tey heljareygu, heiti, ið síðani ta tíð hevur hingið við ánni.

At sjómarkið út eftir vágni nakrantíð skuldi fáa týdning, rann ongum til hugs, so hetta varð tí als ikki umrøtt á hesum fyrsta fundi niðurseturbólkanna millum.

Jú – soleiðis samdust teir um vík og vág; men annars var semjan so sum so, tá talan var um býti av papatrælum og seyði teirra, ið teir saman høvdu rikið í tippi, og sama var við fuglameingi, rekaviði til húsasmíð o.a. - ongar størri orrustir, men hvønn dag sín trega so troyttandi, at Egil at enda bart út bað teir renna seg eitt ávíst stað - nú helt hann í hvussu er leiðina fram útnorður í hav.«

»Hvat so, omma?« róptu vit sum við ein munn.

»Ja – restina kenna tit líka væl sum eg; men um tað var tann sami Egil, ið búsettist á Egilsstøðum á Eysturlandinum í Íslandi, ja – tað veit omma ikki at siga tykkum.«

Heini »half & half«

# Milliónir verða burturtveittar

**MARJUS DAM**
Løgtingsmaður



**Tað er syrgiligt, at hundraðtals milliónir krónur verða blakaðar í havið. Nakað má gerast- beinanvegin-fyri at steðga hesum, sigur Marjus Dam í lesarabrævi**

Fyri fáum árum síðani varð livur smeltað umborð á føroyskum skipum, og fingin til til lands. Rogn í stórum nøgdum vórðu tikin og seld.

Nú skipini, maskinur og umstøður annars áttu at gjørt hagreiðingina munandi betri, verður fiskurin hjá fleiri(ikki øllum) av skipunum ikki bløðgaður, bíligasta model av krivjimaskinu fillar allan innmat úr fiskinum – so hvørki rogn livur ella annað kann førast til lands. Virðir fyri fleiri hundratals milliónir verða harvið oyðiløgd og blakaði í havið. Virkir, í standa klár at taka ímóti vøruni, og sum høvdu kunna selt hesa fyri stóra upphædd standa spyrjandi og umhugsa at stonga virkini.

Flest munnu vera samd um, at hetta er ein heilt skeiv gongd.

Møguleiki at "foredla" fiskin er við hesi gongd burtur. Kvaliteturin verður ofraður fyri kvantitetin. Gongdin skal vendast, og tað beinanvegin. Hetta eiga fiskimenn, reiðarar, vinna á landi saman við myndugleikum at taka stig til at loysa. Heldur ídag enn í morgin.

Eg vil mæla til, at Bjørn Kalsø beinanvegin innkallar umboð fyri vinnu á landi, reiðarar og fiskimannafelag, fyri at finna eina skjóta og góða loysn, so at rogn , livur o.a. verða førd til lands.

Okkara nátturugivna tilfeingi eiga vit at fara væl um!